# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Hækkið játtan til hagtalsstovn

Tað er einki nýtt í tí, at ein tann almenni stovnurin, sum hevur stóran týdning fyri vitan okkara um, hvussu veruliga stendur til í føroyska samfelagnum, búskaparliga og í nógvar aðrar mátar, Hagstovan, leingi hevur tørvað fólk og orku til at kunna gera eitt nóg fullfíggjað og fullkomið arbeiði. Hetta hevur stjórin á stovninum, sum eisini í mong ár var formaður í Búskaparráðnum, gjørt vart við ferð eftir ferð.

Hesin trupulleiki gjørdist uppaftur meira sjónligur í gjár, tá Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisflokins í fyrispurningi á tingi spurdi nýggja fíggjarmálaráðharran, hvussu er stætt við búskapinum, hvat vit veruliga vita um aktuellu støðuna hjá føroyska búskapinum. Har fíggjarmálaráðharrin gjørdi greitt, at vit í mongum førumm ikki hava ánilsi av, hvussu støðan er orsakað ov vánaligum ella bart út manglandi hagtølum.

Stjórin á stovninum segði við útvarpið í gjár, at tað rætt og slætt er manglandi arbeiðsorka, sum ger, at Føroyar ikki hava øll tey hagtøl, sum eru so avgerandi fyri at lýsa búskapin og støðuna hjá búskapinum.

Hetta má sigast at vera einki minni enn ein skandala, tí eitt samfelag sum okkara má vita, hvussu til stendur. Politikararnir og leiðandi myndugleikar, eitt nú landsstýrisfólk og teirra næstu ráðgevar mugu og skulu kenna búskaparstøðuna alla tíðina, annars kunnu hesi ikki hvørki reka politikk ella leiða landið. Hvussu kunnu vit lova í eyst og vest og diskutera stórar íløgur, tá vit mangla veruliga grundarlagið fyri at kunna umrøða slíkt?

Hagtøl eru so nógv. Tey snúgva seg eisini um mangt annað enn búskaparligu støðuna. Tey hava so sanniliga við menniskiskju og alt tað vit takast við at gera. Eitt nú vil tað vera av alstórum týdningi, skulu vit til at gera okkara metingar og fremja eina tilgongd í samfelagnum, um olja verður funnin, at vit kenna veruliga støðuna í landinum, á arbeiðsmarknaðinum, á tí sosiala økinum, á bústaðarøkinum osfr. Soleiðis at vit tryggja okkum, at ein so ógvuslig og nýggj vinna vil kunna ávirka hetta lítla og viðkvæma samfelagið. Eisini her eru nýggj hagtøl neyðug og týdningarmikil.

Tað skal vera okkara vón, at fíggjarmálaráðharrin, sum sjálvur hevur gjørt vart við hesar manglar og sum búskaparfrøðingur og fyrrverandi limur í Búskaparráðnum, kennir teir á egnum kroppi, ger nakað við teir. Hann kann við einum pennastroki taka orðini hjá hagdeildsstjóranum til eftirtektar og hækka upphæddina til Hagstovuna. So einfalt er tað. Tað eru í hvussu er okkara ráð.

Sosialurin

## Takið eina greiða støðu!

JÓHAN PETUR JOHANNESEN



Hetta er ein áheitan á mín egna flokk, Sambandsflokkin, um ikki at vera vinglutur, men at halda seg til stevnuskrá floksins í øllum málum.

Las eina góða grein eftir Jóhan Petersen, formanni í Samhald, har hann sigur, at Sambandsflokkurin byggir sín politikk á fornuft og ikki á kenslur, og tað er júst tað, flokkurin hevur verið kendur fyri.

Tá ið málið um 266b var fyri, vísti flokkurin ikki nógva fornuft. Jú eina tøkk skulu Alfred og Marjus hava fyri at verja stevnuskrá floksins, og okkara land, ímóti avkristnan.

Nú um dagarnar skulu Føroya fólk enn einaferð plágast av einum kjaki um samkynd, ja nú vilja fólk hava skrásett paralag. Nei nú kann verða nokk! Um flokkurin ikki sigur stopp, kann enda við, at hann syndrast. Eg ivist ikki í, at tað vóru nógv sambandsfólk, ið góvu flokkinum tað gula kortið, tá ið 266b var fyri, men tekur núverandi tingmanning undir við skrásettum paralagi, verða vit mong, ið geva tað reyða til næsta val.

Mín áheitan skal tí verða hon, at í tí løtu skrásett paralag verður nevnt í komandi valstríði, meldar flokkurin greitt út ja ella nei, onki við at tað er upp til hin einstaka, tí tíðin er farin frá, at flokkurin kann hava hesa støðu.

Um vit skulu fylgja stevnuskránni er eingin ivi um, at svarið er ímóti skrásettum paralagi. Sigur flokkurin hinvegin ja, so mugu vit broyta greina 1. Alt annað, er at lúgva fyri veljarunum.

Monrovia 23.08.07

## Viðmerking

HERI MOHR



Í Dimmalætting 3. september hevur Majbritt Pauladóttir eina drúgva grein, sum tykist vera inspirerað av mínari grein "Ársins bók," sum hon (Majbritt) hevur lisið við "bilsni," kanska eina mest tí eg skrivaði, at "ein stórur partur av Føroya fólki eru glað og takksom fyri bókina hjá André Niclasen."

Eg síggi meg ikki føran fyri at kommentera hennara sannføring um, at okkara móðurmál er í góðum hondum mótvegis foreldrum, ommum og abbum øðrumegin og barnagørðum og skúlum hinumegin. Men tað er ein lætti at vita, "at ein ikki vildi forða fyri, at bókin verður givin út." Takkað veri "einum frælsum fólki." (!!) Hóast eg sum sagt ikki dugi at leggja meg út í kjak við Majbritt Pauladóttir - vit kenna orðmyndina um eggið, sum skuldi læra hønuna at verpa – so tó hetta stutta:

- Greinin hjá Majbritt byrjar soleiðis: "Hevði eg bara havt somu møguleikar sum Heri Mohr man hava…". Hon skyldar lesarunum at upplýsa, hvørjar møguleikar undirritaði hevur, og sum hon eftir øllum at døma ikki hevur.

- Eg eri ikki filologur, lingvistur ella á annan hátt málfrøðingur, hóast MP javnmetur meg við slíkar. Havi stóran part av mínum lívi verið skrivstovumaður.

- MP vil vera við, at tað ikki kann loypa hvøkk á nakran, at "eldri fólk" ikki eru før fyri at hjálpa ommu- og abbabørnum við heimaarbeiði orsakað av vantandi kunnleika til móðurmálið. Tað er mest sum í lagi, tí soleiðis er tað eisini í øðrum londum, vil hon vera við.

So, so, - jamen, hvussu bóru Heðin Brú, Ricard Long, Knut Hamsun, Sigrid Undset, Grundtvig og mong onnur seg at við at skriva á móðurmálinum, til tey gjørdust elligomul?

- Í greinini skrivar MP, at "eg fari at minna um….". Óivað meinar hon: "Eg fari at minna á, at hetta orðið ikki er komið…". Orðið um er her retrospektivt, afturlítandi, meðan orðið á er áminnandi.

- Majbritt skrivar, at mín grein var dagfest hin 22. august. Nei, hon var dagfest 22. august ella tann 22. august. Á donskum merkir hin "den anden" og á enskum "another". Hví nakrir føroyingar fyri hálvari øld síðani fóru at skriva hin um dagfesting í staðin fyri tann, er kanska ikki trupult at ímynda sær?

Nú kom eggið kortini undan fjaðrunum.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.